KVÆÐI

Aldur og stað
Kvæði eru skaldskapur av mannamunni eins og ævintýr, sagnir og skjaldur. Elstu kvæðini eru úr 14. øld. Søgurnar eru kendar og fara ofta fram í Miðevropa og Noregi. Hendingarnar eru frá uml. ár 1000 og heilt aftur í 5. øld. Kvæðini eru broytt upp gjøgnum tíðirnar. Sumt er gloymt, og okkurt er vorðið yrkt afturat.

Eyðkenni
Eldru kvæðini eru hátíðarlig, og tey siga frá hendingum í øðrum londum. Yngru kvæðini eru somuleiðis hátíðarlig og siga frá hendingum í Føroyum og øðrum londum. Um arbeitt verður við yngri kvæðum, er viðkomandi at siga frá **yrkjaranum**. Nógv kvæði eru skipað eftir sama leisti við inngangsørindi, útgangsørindi, rími, niðurlagi, uppafturtøkum, ferðaørindum, skaldsligum orðum og reypi.

Kvæðabólkarnir:
Kappakvæði: søgur um fornar kappar, sum hava livað í Miðevropa og í Norðurlondum fyri og í víkingaøldini, t.d. Sjúrðarkvæðini sum eru Regin smiður, Brynhildartáttur og Høgnatáttur og kvæði um Sigmund Brestisson og Trónd í Gøtu.

Riddarakvæði: søgur um riddarar, t.d. Flóvin Bænadiktsson og Harra Pætur og Elinborg.

Náttúrukvæði: søgur úr fólkatrúgv og ævintýrheimi, Harpuríma og Ólavur Riddararós.

Skemtikvæði: stuttligar søgur t.d. Øskudólgur og Kall og Svein Ungi.

Sannsøgulig kvæði: søgur um persónar, sum hava livað um somu tíð sum yrkjarin. Her kunnu nevnast Frúgvin Margreta og Frú Dagmoy.

Halgikvæði: søgur úr kristiligum sagnatilfari, t.d. Torkils døtur og Rudisar vísa.

Bygnaður
Inngangsørindi: Bygnaðurin er eyðkendur við, at ofta hava kvæðini eitt inngangsørindi, sum vendir sær til tey dansandi. T.d. byrja kvæði ofta við ”Vilja tit nú lýða á”, ”Gevið ljóð og lýðið á”, ”Vilja tit hoyra kvæði mítt, vilja tit orðum trúgva”. Stundum verður sagt frá, hvaðani evnið er tikið, t.d. ”Frøði er komið úr Íslandi.”

Ørindislongd/rím: Ørindini í kvæðunum hava oftast 2 ella 4 reglur, onkuntíð fleiri. Í tvíregluørindunum rímar við endarími, meðan í fýraregluørindunum bera 2. og 4. regla upp á rím við endarími. Vit síggja bæði heilrím, hálvrím og stavrím í kvæðum. Heilrím kann t.d. vera ”garð – varð”, ”kvøða – røða”, hálvrím kann vera ”fram – rann”. Stavrím er eisini kent í føroyskari kvæðayrking. Stavrím er, tá ið tvey ella fleiri herðingasterk orð í somu reglu ella ørindi í bundnum skaldskapi byrja við sama hjáljóði t.d. "**Grani** bar **gullið** av heiði**".**

Niðurlag: Vit skilja millum episkt og lýriskt niðurlag.

Episka niðurlagið er frásigandi, og tað hevur samband við gongdina í kvæðinum:

Grani bar gullið av heiði,
brá hann sínum brandi av reiði,
Sjúrður vá av orminum,
Grani bar gullið av heiði.
(Regin smiður)

Tað lýriska niðurlagið er kensluborið og hevur einki samband við sjálvt innihaldið í kvæðinum at gera:

Her er gott at dansa,
stovan hon er nýggj,
stokkar eru av stáli gjørdir,
takið er av blýggj.
Her er gott at dansa.
(Kópakvæði)

Niðurlagið kann eisini vera flættað inn í ørindini, sum tað er í Harpurímu:
Har komu tveir biðlar ríðandi í garð,
- eg biði tygur renna -
bóðu moy, sum yngri var.
- Rúnarmenn, gerið tað mín jomfrú,
eg biði tygur:
rennið, talið varliga við teir, rúnarmenn!

Reyp/drama: Ofta verður tikið ógvusliga til í kvæðum okkara. Har eru grimir risar, sum berjast við jarðklettum og drekka vøtnini tóm. Tá ið bátur fer úr neysti, bresta lunnar, og jørðin skelvur. Tá ið Tróndur sigldi um Skúvoyarfjørð, bognaði skútan sum ein gjørð.

Uppafturtøkur: Ofta verða ørindi endurtikin næstan orðarætt, tað verða tey, fyri at kvæðið skal vera lættari at kvøða og dansa. Uppafturtøkurnar síggjast bæði í sama kvæði, men tær koma eisini fyri millum kvæði, tá nevna vit tey ferðaørindi. T.d. koma hesa ørindi fyri í fleiri kvæðum:

“Hon kann alt við hondum gera,
sømir seg væl ein kvinna,
hon kann bæði lesa og skriva,
reyðargull kann hon spinna.”

"Gingu teir til strandar oman,
ríkir menn og reystir,
lunnar brustu, og jørðin skalv,
teir drógu knørr úr neysti."

Skaldslig orð: Nógv skaldslig og gomul orð koma fyri í føroysku kvæðunum, og hetta er eitt eyðkenni fyri kvæðini. Persónar, lutir og hendingar verða nevnd við øðrum orðum. Maður kann t.d. í einum kvæði eita *seggur*, *greppur* ella *menjarbaldur*. Kvinna verður nevnd *sprund*, *fljóð*, *drós* og *leikalind*. Svørð kunnu eita *brandur*, *mæki*, *benjarkolvur* og *eggjateinur*, og blóð verður nevnt *droyri* ella *benjardøgg* (ben = sár, døgg = væta, t.e. vætan, sum kemur úr einum sári). Stríð verður ofta nevnt *randargný*, *brynjugálvur* ella *snildarbragd*.

Útgangsørindi: Útgangsørindið er síðsta ørindi í kvæðinum. Ofta hava kvæðini eitt útgangsørindi, sum vendir sær til tey dansandi á sama hátt sum inngangsørindi. Kvæði kunnu t.d. enda við "Nú kann eg ikki kvøða meir", "Eg kann ikki kvøða meir" e.a.

Kvæði kunnu greinast eftir frymlinum niðanfyri.

Frymil til kvæðagreining

1: Les kvæðið og sprota ókend orð

2: Hvat er heitið á kvæðinum?

3: Skipa søgugongdina.

4: Hvussu ljóðar inngangsørindið?

5: Hvussu er niðurlagið?

6: Hvussu ljóðar útgangsørindið?

7: Bygnaður

Hvussu er kvæðið skipað?

- ørindi, ørindalongd
- rím
- reyp
- skaldslig orð
- uppafturtøkur
- ferðaørindi

8: Hvørji evni eru í kvæðinum?

9: Hvat slag av kvæði er hetta? (kappakvæði, riddarakvæði, náttúrukvæði, skemtikvæði, sannsøguligt kvæði ella halgikvæði)

10: Er yrkjarin kendur? Hvat vita vit um hann?

11: Set í frásjón. Er nakað í kvæðinum, sum tú kennir aftur úr tínum lívi? Kennir tú onkra søgu, film ella sjónvarpsrøð við líknandi søgugongd?